*Í kjalarvørri norrønu landnámsvíkinga:*

# Við Hafsteini og Axel til Brøttulíð



**Hafstein og Axel hittast í Vágsbotni, umborð á hvør sínum fari. Í næstum fara teir báðir við Eldingi til Brøttulíð**

Í ár verður stórt hátíðarhald í Brøttulíð í Suðurgrønlandi í sambandi við, at tað eru 1000 ár síðani, at Leivur Hepni fann Vínland - og síðani kristindómurin kom til Grønlands. Millum gestirnar tá verða teir báðir sjógarparnir Hafstein Jóhannsson úr Noregi og Axel Skoubo av Sandi. Nú um dagarnar setti teir hvørjum øðrum stevnu í Havn

*Orð og myndir:*
*Jan Müller*

Hann er føddur og uppvaksin í Íslandi, men hevur seinastu 25 árini búð í Noregi. í dag er hann 64 ára gamal og „still going strong“. Hann telist millum fremstu frítíðarsiglarnar í hesum partinum av heiminum. Nú um dagarnar legði hann at í Vágsbotni við sínum heimabygda snotuliga fari, Eldingi - á enn eini spennandi og sjáldsamari sjóferð.

Maðurin eitur Hafstein Jóhannsson og er kanska mest kendur fyri stóra bragd sítt - sum einasti norðbúgvi higartil - at sigla jørðina runt - 25.000 sjómíl - einsamallur í sínum egna báti í 241 dagar. Tað var fyri umleið 10 árum síðani.

Hóast hann nærkast pensiónsalduri, so er Hafstein framvegis sum ein sprelskur unglingi á at líta, og hann hevur á ongan hátt mist hugin til sjógvin og til tær avbjóðingar og ta friðsælu, sum havið hevur at bjóða einum frítíðarsiglara.

Nú Hafstein legði at í Vágsbátni við báti sínum „Eldingi“, ið hann sjálvur hevur teknað og smíðað í garasju síni í Noregi, var ein „gamal“ kenningur og tók ímóti honum. Tað var Axel Skoubo, skúlastóri á Sandi. Teir báðir kennast frá mongu ferðunum teir hava gjørt - í hvør sínum báti - til oyggjarnar út fyri Skotland, her serstakliga Hetland.

Nú teir møtast aftur er hýrurin góður. Veðrið er eisini av tí fægrasta, og í Vágibotni eru ross, fiskur, børn alt í einum. Har er fiskikapping og annað til frama fyri Bátafelagið.

Eitt er at teir - Axel og Hafstein - hittast sum gamlir vinir. Men teir hava eisini okkurt í kvittanum saman. Hafstein er við at gera enn eina spennandi ferð millum lond. Hann er farin úr Noregi í kjalarvørri norrønu landnámsvíkinga, sum hann sjálvur nevnir tað. Tað eru umleið 1000 ár síðani, at víkingar løgdu frá landi í Noregi, búsettu seg í Hetlandi, Føroyum, Íslandi, Grønlandi og at enda eisini funnu Vínland og settur búgv har.

Hafstein ætlar sær at vera við til hátíðarhaldið í Brattalíð 15. juni í ár, tá nógv verður gjørt burtur úr 1000 ára haldinum fyri búsetingini har. Og hann ætlar sær eisini at vera við til hátíðarhaldið í Leifsbúð í Vínlandi tann 28. juli.

Nú teir møtast í Vágsbotni, Hafstein umborð á Eldingi og Axel umborð á Laterna Magica, minnast teir á góðar dagar í Lervick. Tað var har teir báðir sjógarparnir møttust fyrstu ferð

- Eg minnst so væl, tá vit møttust fyrstu ferð í Lervick. Hetta var um summarið 1992. Eg var farin til Hetlands saman konuni og soninum, tá tað kom ódnarveður, og vit ikki sluppu heim. Tey fóru tí við Norrønu og eg mátti so bíða eftir betri veðri. Mær dámdi einki at fara einsamallur heim, tí eg hevði ikki roynt tað áður. Tá var tað, at eg møtti Hafsteini, sum segði mær frá ferðini jørðina runt einsamallur um alla jørðina. Hann helt ikki, at eg hevði nakað at vera bangin fyri. Tí tá hann hevði kunnað verið einsamallur í 241 dagar, so mátti ikki fara at bila hjá mær í tveir dagar. Hann minti meg á at seta sjálvstýraran til og at minnast til vekkaran, tá eg nærkaðist landi aftur.

Síðani tá hevur Axel havt samband við Hafstein. Hvørt ár á páskum kemur kort til Sands. Men hesaferð vóru áhugaverd tíðindi at frætta, tá kortið kom. Nú ætlaði Havstein sær aftur á langferð.

Og Axel, sum er væl kendur í Grønlandi, var skjótur at biðja um tjans. Jú pláss var fyri sær eisini lat Hafstein hann vita.

Ætlanin er so at flúgva til Íslands og at fara við Eldingi til Brøttulíð tann 4. juli. Axel sær fram til at koma aftur til Grønlands, nú hann arbeiddi sum skúlastjóri har í tvey ár, og nettup í tí økinum, har Brattalíð liggur.

Nú Hafstein longu er lagdur til brots á hesi áhugaverdu og søguligu ferð hevur hann eisini tikið við sær steinar úr Noregi og úr londunum, ið víkingarnir komu til á leiðini vestur í hav. Úr Noregi hevur hann tveir steinar, sama úr Hetlandi og nú eisini úr Føroyum. Hafstein helt tað kundi verið áhugavert at fáa steinarnar úr einum plássi, har víkingar hava hildið til. Og her var Axel honum góðum í ráðum. Saman fóru teir til Kvívíkar og oman í mølina eftir tveimum stórum steinum, sum nú liggja trygt í botninum umborð á Eldingi, ið skjótt fer at gera klárt til ferðina til Grønlands og Vínlands.






**Hafstein Jóhannsson er føddur í Akranesi í Íslandi. Har arbeiddi hann sum kavari og hevði egnan bjargingarbát í eini 11 ár. Síðani fór hann at sigla við norskum skipi og endin varð, at hann búsetti seg í Noregi í 1974, tá hann mynstraði av. Herfyri varð bók skrivað um Hafstein og hansara mongu sjóferðir og roysni**



**Axel og Hafstein her staddir við víkingagravirnar í Kvívík. Steinarnir, sum skulu til Grønlands og Vínlands eru úr mølini**

**Stórt hátíðarhald**

Hafstein og Axel verða neyvan tað einastu, ið leggja leiðina til Brøttulíð, tá hátíðarhaldið verður har. Tað verður nevniliga gjørt rættiliga nógv burtur úr hesum haldinum. Tann, sum hevur áhuga fyri tí, kann fara á Internetið og leita á www.leif.2000 ella á www.greenland-guide.gl.

Verkætlanin verður kallað „Project Leif 2000“. Har verður greitt frá søguni um Leiv Hepna og Eirik Reyða. Tað var í ár 1000, at Leivur Hepni, sonur Eirik Reyða setti kós móti Norðuramerika og kom til Vínland ella í dag kent sum New Foundland. Hetta árið varð eisini fyrsta kristna kirkjan stovnað í Brattalíð í Suðurgrønlandi.

Tað er grønlendska heimastýrið, sum ynskir at hátíðarhalda hesar søguligu hendingar við ymsum tiltøkum í ár 2000. Hesar fyrireikingar verða eisini gjørdar í samstarvi við íslendsku stjórnina og felagsskapir í bæði Canada og USA.

Sambart upplýsingunum á internetsíðuni er endamálið við hesum tiltaki m.a. at seta Grønland á heimskortið, at stimbra grønlendska samleikan og søgu, og at styrkja bondini millum Grønland og grannar tess fyri eystan og vestan. Men eins og føroyingar hátíðarhalda 1000 ára haldið fyri kristniboðanina, so gera grønlendingar tað eisini í hesum árinum.

Vit kenna øll søguna um Eirik Reyða, sum fór úr Íslandi og setti upp í Grønlandi og har grundaði Brattalíð. Tá Leivur Hepni vildi boða kristindómin í Grønlandi setti Eirikur Reyði seg upp ímóti tí. Men tá var tað, at kona hansara, Tjóðhildur, gav honum tvinnar kostir í at velja. Hann slapp ikki at sova hjá henni aftur, fyrr enn hann hevði latið seg kristna. Eftir tað varð kirkja bygd á staðnum. Leivdirnar av henni vórðu funnar í 1961. Leivdirnar av bóndagarðinum vórðu funnar í 1932. Nú verða so bæði kirkjan og bóndagarðurin bygdir av nýggjum.

Eingin minni enn grønlendski landsstýrisformaðurin, Jonathan Motzfeldt er verji fyri hesi verkætlanini.

Hátíðarhaldið í Brøttulíð, „Viking/Inuit Festival! verður 15., 16. og 17. juli. Umframt mongu gestirnar úr grannlondum, harímillum Axel Skoubo og Hafstein Jóhannsson við Eldingi verður eisini eitt víkingaskip á staðnum kallað „Íslendingur“. Ætlanin er eisini at avdúka eina standmynd av Leivi Hepna.

Δ




**Eldingur er bygdur í garasjuni hjá Hafsteini. Hann er 63 føtur langur og er sera sjógóður**